Tryggingareftirlitið

**Tórshavn 30. juni 2017**
Journalnr.: 16/00162-21

Til móttakaran á viðhefta yvirliti

**Uppskot til kunngerð um gjaldføri (solvens) og rakstrarætlanir hjá tryggingarfeløgum**

Tryggingareftirlitið sendi tann 11. november 2016 *Uppskot til kunngerð um gjaldføri (solvens) og rakstrarætlanir hjá tryggingarfeløgum* til hoyringar við svarfreist 16. januar 2017.

Uppskotið tekur útgangsstøði í Finanstilsynets *bekendtgørelse nr. 1313 af 08/12/2014 om solvens og driftsplaner for forsikringsselskaber*, ið er seinast solvenskunngerðin, ið var galdandi fyri donsku tryggingarfeløg áðrenn farið varð yvir til Solvens II reglurnar tann 1. januar 2016.

Við at taka útgangsstøði í hesi kunngerð verða solvensreglurnar fyri tey føroysku tryggingarfeløgini at kalla tær somu, ið eru galdandi fyri tryggingarfeløg í ES, ið gera upp solvens eftir sonevnda standardmodellinum í Solvens II regluverkinum.

Í hoyringarskrivinum varð m.a. boðað frá, at um munandi broytingar vórðu gjørdar í uppskotinum til kunngerð, var ætlanin at senda eitt dagført uppskot til hoyringar, áðrenn kunngerðin verður sett í gildi.

Vísandi til at ávísar broytingar eru gjørdar í uppskotinum sendir Tryggingareftirlitið við hesum eitt dagført *Uppskot til kunngerð um gjaldføri (solvens) og rakstrarætlanir hjá tryggingarfeløgum* til hoyringar, sí viðhefta fylgiskjal, ið vísir allar broytingarnar í mun til í mun til donsku kunngerðina.

Innihaldsligu broytingarnar í dagførda uppskotinum til kunngerð eru lýstar nærri í *Notat om efterfølgende ændringer i udkast til solvensbekendtgørelsen*, sí viðhefta fylgiskjal.

Nýggja kunngerðin um gjaldføri (solvens) og rakstrarætlanir hjá tryggingarfeløgum verður eftir ætlan sett í gildi 1. januar 2018.

Møguligar viðmerkingar til uppskotið skulu vera Tryggingareftirlitinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 11. september 2017. Viðmerkingar og spurningar kunnu sendast við telduposti til gn@tryggingareftirlitid.fo ella til Tryggingareftirlitið stílað til Gudmundur E. Nónstein, Skálatrøð 20, Postboks 73, FO-110 Tórshavn.

Vinarliga

Jógvan Thomsen

Stjóri

/Gudmundur Effersøe Nónstein